# Nýggja navnið verður Oddi




*Navnið á sparibússuni hjá Suðuroyar Sparikassa verður Oddi. Á samkomu í hølunum hjá Suðuroyar Sparikassa í Havn varð vinnarin av navnakappingini avdúkaður*

STEFAN Í SKORINI

Vinnarin av navnakappingini var 2 ára gamli Fríði Bjarkhamar úr Leirvík. Fríði kallar ein av sínum egnu hvalum Oddi, har av kom hugskotið til hesa navnakapping, og hvalurin hjá Suðuroyar Sparikassa kann nú eisini kallast Oddi. Fríði fekk eina virðisløn áljóðandi 1500 kr. frá Suðuroyar Sparikassa fyri at koma við besta navninum til hvalin. Navnið á kontoini verður sjálvsagt Odda-konto, og tey børn, sum tekna slíka konto fáa eisini eina gávu samstundis.

Nummar tvey av navnakappingini varð Anna Sára Johansen, sum fekk eina peningagávu á 1000 kr. Nummar trý gjørdist Bjørk Herup Olsen, og fekk hon eina gávu á 500 kr. Tær báðar eru frá Havn.

Luttøkan til kappingina var sera góð, og heili 274 uppskot vórðu send inn til kappingina. Eisini vórðu eini 70 tekningar av sparibússuni sendar inn til kappingina. Ætlanin er, at hesar tekningar skulu verða vístar á eini framsýning, so høvi verður hjá øllum at síggja tær.

## Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Fríggjadagin**
Skýggjað og møguliga regn av og á. Lot til andøvsgul av vestri og útnyrðingi, 3 - 8 m/s. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Leygardagin**
Mest skýggjað og regn av og á. Lot til andøvsgul, mest av suðri, 3 - 8 m/s. Út á dagin stívt andøvsgul og lækkar til landnyrðing, 5 - 10 m/s. Hitin millum 5 og 10 stig.




**Sunnudagin**
Skýggjað og møguleiki fyri regni, men út á dagin klárar í og ælaveður. Gul til stívt andøvsgul av norði og landnyrðingi, 5 - 10 m/s. Hitin millum 5 og 10 stig.

**Mánadagin og týsdagin**
Skiftandi veður við ælaveðri, men eisini sól av og á. Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og norði, 5 til 10 m/s. Hitin millum 5 og 10 stig.




Eitt hátrýst, 1025 hPa, langt vestan fyri bretsku oyggjarnar stendur í stað og mennist. Eitt lágtrýst yvir Landnyringsgrønlandi sendir eina veika hitabrúgv móti Føroyum




Eitt lágtrýst, 990 hPa, í ein útsynning úr Grønlandi rekur í ein landnyring, seinni eystan, og kemur um vikuskiftið yvir Føroyar. Seinni streymar køld luft inn yviroyggjarnar av norði.




**Hitalagið mált frá 05./07.kl 06⁰⁰–06./07. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,8°C**
Minsti hiti máldur í juli: **0,4°** Mesti hiti máldur í juli: **20,2°**




Avfallið: 0,1 mm – **mált frá 05./07. kl 6⁰⁰–06./07. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í juli: 0,2 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 11 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 10 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 15 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 24 |
| Keypmannahavn | 18 |
| Helsinki | 22 |
| Moskva | 20 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 32 |
| Paris | 19 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 38 |
| Malta | 36 |
| Tunis | 36 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 37 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 15 |
| New York | 28 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 29 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 19 |

## Vestfalskyrrindi

1. juli: Tendring/Mánin næstur jørðini
4. juli: Jørðin longst frá sólini
8. juli: Fyrra kvarter

Kelda: Skipalistin 2000

| Dagur | Suðuoyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. juli | 11.21 | 23.46 | 10.21 | 22.46 | 10.36 | 23.01 | 0.55 | 13.21 | 1.55 | 14.21 | 9.36 | 22.01 | 8.36 | 21.01 | 11.36 | – | 0.10 | 12.36 | 11.06 | 23.31 | – | 12.21 |
| 8. juli | – | 12.14 | 11.14 | 23.44 | 11.29 | 23.59 | 1.46 | 14.14 | 2.46 | 15.14 | 10.29 | 22.59 | 9.29 | 21.59 | 0.01 | 12.29 | 1.01 | 13.29 | 11.59 | – | 0.46 | 13.14 |
| 9. juli | 0.44 | 13.17 | – | 12.17 | – | 12.32 | 2.44 | 15.17 | 3.44 | 16.17 | 11.32 | – | 10.32 | 23.06 | 0.59 | 13.32 | 1.59 | 14.32 | 0.29 | 13.02 | 1.44 | 14.17 |
| 10. juli | 1.51 | 14.27 | 0.51 | 13.27 | 1.06 | 13.42 | 3.51 | 16.27 | 4.51 | 17.27 | 0.06 | 12.42 | 11.42 | – | 2.06 | 14.42 | 3.06 | 15.42 | 1.36 | 14.12 | 2.51 | 15.27 |

variant

Galvaniseraðir viðfestisvognar



Sosialurin - 311820

Eykalutir, útgerð, søla og service. Vit útvega sleipikrókar til øll bilmerki!

Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008